


# KAJ2

**EITT KRÍGGI ER MILLUM HESAR BÁÐAR MYNDIRNAR** av skiparanum Kaj, og tað er hetta kríggj, seinni heimsbardagi, annað bindið í ævisøguni um Kaj snýr seg. Seinni heimsbardagi var eisini ein gulltíð fyri teir sum sluppu at sigla. Hvussu nógv fortjentu teir? Eitt yvirlit er aftast í bókini yvir inntøkurnar hjá hvørjum einstøkum manni, sum sigldi hjá Kjølbro, enntá túr fyri túr undir krígnum.

*Bíleggjast kann eisini beinleiðis gjøgnum heimasíðuna www.hellurnar.com.*

FØROYAPRENT · TEL. 314 555

## Bíleggingarseðil

Undirritaði ynskir at fáa annað bindið, **"Kaj 2 – ein dokumentarisk ævisøga"** sendandi við postinum útgávudagin, sum verður seinnu helvt av oktober. Bókin er 440 síður og kostar 399,- kr. í sølubúðunum. Til ber at keypa bæði bindini gjøgnum hendan bíleggingarseðil beinleiðis frá forlagnum fyri 349 krónur hvørt, tá er postgjald íroknað.



Verður sent ópostað (móttakarin rindar postgjaldið)

330

Eg bíleggi: ☐ KAJ ____ stk. (*fyrsta bind*) ☐ KAJ2 ____ stk. (*annað bind*)

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

____________________

Postnummar: ____________________

Bygd/býur: ____________________

____________________
*Undirskrift*

**Forlagið Hellurnar**
v/Jústinus Leivsson Eidesgaard
Ovaragøta 1, 188 Hoyvík.
Tel. 322800 ella 223143
Teldupostur: justinus@post.olivant.fo
www.hellurnar.com




# Ljómur og Suðuroyar Consert Band høvdu góða konsert

## Árliga Allahalganna-konsertin hjá Ljómi var í gjárkvøldið í Vágs Kirkju og eydnaðist væl

Vanligt er, at Kirkjukórið Ljómur hevur Allahalganna konsert í november. Og í gjárkvøldið hevði Ljómur árligu konsertina og Dorte Tilma stjórnaði kórinum.

Afturat sanginum og urguspæli var eisini tónleikur frá Suðuroyar Consert Band. Hetta eru næmingar í Suðuroyar Musikkskúla undir leiðslu av Ulf Nordlund.

Konsertin hevur hátíðardám og vanliga eru nógvir lurtarar og so var eisini hesaferð.

Á skránni hjá Ljómi stóð Himlarnir kunngera, So eiggilig gleðin, felagssálmurin Eitt snjóhvítt herlið er at sjá, Kór, urga og orkestur; úr Judas Maccabæus, Beati Mortui, Like as the hart, Herr ich schrei' zu dir, Nú hvítna tindar, So friðarlig grøvin, Teach me Lord og Føgur er foldin við blásarum, urgu og síðsta ørindi sum felagssálmi.

Nú hvítna tindar hevur serstakt tilknýti til kórið og er eisini felagssálmur við Allahalganna konsertirnar og tá er eisini offurgongd. Hetta er fastur táttur við hesar konsertirnar.

Orkestrið spældi Marsj úr Alceste og Abide with me.

Bæði kór og orkestur komu sera væl frá konsertini.

Ein hevur mangan hug at undrast yvir sterka ljómin í Ljómi, tí talið á sangarum í kórinum er minni, enn ein skuldi hildið, um ein letur oyruni døma. Ikki stórt, men eitt dugnaligt kór við traditiónum.

Og til felagssangin við endan á tímalongu konsertini, Føgur er foldin, ljómaðu cornettin hjá Rakul og trombonin hjá Sólfríð framúr væl.

Ein gleðilig árlig hending fór framvið og ein tími gekk skjótt, tí tíðin gongur skjótt, tá ein hugnar sær.

**-do-**


